HOFF STOFF

# Vitjaðu stórsligna landslagið við Gjógv

**Tá ið Margretha, Heindrikur, Fríðrikur og Mary fóru úr Leirvík, skiltust teirra vegir eina stund. Tey bæði "gomlu" fóru til Elduvíkar, meðan krúnprinsahjúnini fóru til Gjáar**

HOFF-STOFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Fríðrikur og Mary við fylgi á veg niðanaftur úr Gjónni, har kór sang vælljómandi sangir fyri teimum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Við Gjógv byrjaði vitjanin við kirkjuna, har bygdaráðið í Sunda kommunu við gjáarmanninum, Sofusi Johannesen og borgarstjóranum, Heðini Zachariassen, á odda tóku ímóti og heilsaðu krúnprinsahjúnunum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, var eisini við í fylginum.

Úr kirkjutúninum varð farið á minnisvarðan og síðan heim í Gjónna, har kór sang vælljómandi sangir, sum rungaðu niðan úr Gjónni og upp til alt fólkið, sum bíðaði uppi á bakkanum.

Landslagið við Gjógv er hugtakandi, og áður hevur danska kongshúsið víst staðnum stóran áhuga.

Hesaferð var tað so Fríðrikur, krúnprinsur, sum ynskti at síggja Gjógv við øllum tí vakurleika, sum bygdin goymir.

## Fór at regna

Veðrið var framvegis gott og turt, meðan Fríðrikur og Mary saman við Sofusi, Heðini og øðrum vóru niðri í gjónni – og veðrið var eisini hampiligt, tá ið tey við fylgi gingu sær ein túr úteftir bakkanum.

Tað var byrjað at regna hesa løtu, og sum frá leið, gjørdist rættiliga vát.

Tó ikki so, at tað bilti.

Á veg heimaftur av bakkanum vórðu krúnprinsahjúnini boðin til borð í bygdahúsinum, har tey fingu ein bita og okkurt at leska sær við.

Steðgurin í bygdahúsinum var stuttur, tí tíðin rann undan.

## Stórsligið

Vitjanin hjá Fríðriki og Mary við Gjógv var væl eydnað, og nógv fólk nýttu høvi at fylgja hjúnunum á ferðini gjøgnum vøkru bygdina.

Sambært teimum, ið fylgdust við krúnprinsahjúnunum, vóru tey ógvuliga hugtikin av tí, tey sóu – og serliga var tað Gjógvin og landslagið uttanum Gjónna sum fall teimum í eyguni.



*Krúnprinsahjúnini vildu sleppa ein túr úteftir bakkanum, har onnur úr danska kongshúsinum áður hava verið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Løgdu ikki nógv í kongavitjan…

**Hylurin í ánni við Gjógv eru eitt áhugavert spælipláss hjá børnum, men at hesin mikudagin var meira áhugaverdur enn krúnprinsavitjanin, man vera ein søga fyri seg**

HOFF-STOFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Meðan Fríðrikur, krúnprinsur og Mary, krúnprinsessa, vitjaðu við Gjógv seinnapartin mikudagin, høvdu hesir báðir smádreingirnir størri áhuga fyri barnavinarliga hylinum enn vitjanini úr kongshúsinum.

Hesar myndirnar eru tiknar eftir, at ungu krúnprinsahjúnunum vóru komin til bygdar.

Vit steðgaðu á og spurdu Rúna Nónsgjógv (10) og systkinabarnið, Njál Hansen (8), um teir ikki høvdu sæð Fríðrik og Mary.

Jú, annar hevði sæð á tey í einum bili, men annars var áhugin hjá hesum báðum smádreingjunum størri fyri hylinum og bátunum enn prinsa-og prinsessuvitjanini.

Og tó; tann eini flaggaði við føroyskum flaggi í samband við henda hátíðardag við Gjógv.

## Dragandi spælipláss

Rúni býr í Leirvík, og Njál býr í Havn. Teir hava báðir røtur við Gjógv , har teir týðum eru og vitja – og tá hevur hylurin størsta áhuga sum spælipláss.

Hendan dagin stuttleikaðu Rúni og Njál sær óført í hylinum, meðan restin av bygdini fylgdi eftir krúnprinsahjúnunum.

*Teir høvdu ikki "stundir" at fylgja krúnprinsahjúnunum, nú teir vóru við Gjógv og vitjaðu*
*Myndir: Vilmund Jacobsen*



